

TOYOTA AVENSIS 2,0 D4-D TERRA — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: GB 644 KM: 96.000
Árgangur: 20.11.01 Seinast sýnaður: 11.02.05

Útgjald: kr. 37.150,- Kr. 148.000,-



TOYOTA COROLLA 1,3 S XLI SEDAN

Skrásetingarnr.: DJ 601 KM: 178.000
Árgangur: 03.10.96 Seinast sýnaður: 21.06.05

Kr. 46.000,-



TOYOTA AVENSIS 1,8 LINEA TERRA SED — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: UG 156 KM: 56.000
Árgangur: 06.02.02 Seinast sýnaður: 06.02.02
Viðmerking: Klima - Fjarstýrt sentrallás - Radio/CD.

Útgjald: Kr. 36.900,- Kr. 147.000,-



OPEL ASTRA 2,0 DIESEL, AUT.GEAR — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: DN 206 KM: 40.000
Árgangur: 29.03.00 Seinast sýnaður: 14.04.04

Útgjald. kr. 33.460,- Kr. 95.000,-



TOYOTA AVENSIS 2,0 TD Stw. — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: MD 583 KM: 87.000
Árgangur: 29.09.98 Seinast sýnaður: 09.08.04
Viðmerking: El rútar - el spegl - fløguspælara - krók - hæddarstilling av lyktum - 4 x airbags

Útgjald kr. 34.510,- Kr. 98.000,-



SUBARU LEGACY GL 2,0

Skrásetingarnr.: HU 698 KM: 115.000
Árgangur: 25.09.96 Seinast sýnaður: 25.08.04
Viðmerking: Sentrallás - Elrútar A+F - Radio/CD - El spegl

Kr. 45.000,-



TOYOTA COROLLA 1,6 — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: HR 428 KM: 29.000
Árgangur: 29.03.04 Seinast sýnaður: 29.03.04
Viðmerking: Aircondition - Fjarstýrt sentrallás - Radio/CD

Útgjald kr. 41.150,- Kr. 164.000,-



FORD MONDEO 1,8 TD

Skrásetingarnr.: DJ 945 KM: 107.000
Árgangur: 14.08.98 Seinast sýnaður: 01.03.05

Útgjald kr. 22.960,- Kr. 65.000,-



TOYOTA YARIS 1,0 H/B TERRA V/KOMF — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: HF 186 KM: 31.000
Árgangur: 16.01.03 Seinast sýnaður: 16.01.03
Viðmerking: Fjarstýrt sentrallás - Leðurróður - Radio/CD - Elrútar framman

Útgjald kr. 27.650,- Kr. 110.000,-



KIA SPORTAGE 2,0 4X4 Vørubilur

Skrásetingarnr.: TL 334 KM: 86.000
Árgangur: 10.10.97 Seinast sýnaður: 06.12.04

Kr. 45.000,-

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Hálkan komin



Í morgun var nakað av hálku ymsastaðnis í landinum, og sum vanligt, tá ið fyrsta hálkan á vetrinum ger vart við seg, kemur hetta óvart á bilførarar. Løgreglan í Havn og í Eysturoynni segði seg tó ikki hava frætt um nakað ferðsluóhapp í sambandi við hálku, tá ið vit tosaðu við tær mánamorgunin. Men sum tað sæst á myndini, so var onkur bilur farin út av vegnum. Hesa myndina tók okkara maður um hálvgum áttatíðina mánamorgunin beint við Norðskálatunnilin.

**tn**

# Drúgv biljagstran

**Um hálvgum fimmtíðina sunnunáttina gjørdi løgreglan í Havn eina roynd at steðga einum bili, men bilførarin koyrdi undan, og hann bleiv ikki tikin fyrr enn komið var í Eysturoynna**

POLITITÍÐINDI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Løgreglan fekk illgruna um, at bilførarin koyrdi ávirkaður, og tí vildu teir steðga honum. Men bilførarin aktaði ikki boðunum frá løgregluni, og hann helt tí undan við nógvari ferð. Av tí at ferðin var so nógv, og maðurin ikki var koyriførur, valdi løgreglan ikki at leggja ov nógv fyri í royndini at fáa bilin aftur. Teir koyrdu aftaná bilinum, men hildu eina ávísa fjarstøðu, so at bilførarin ikki skuldi kenna seg ov hart kroystan, tí so kundi tað lættliga enda við eini vanlukku.

Men alt fær ein enda, og tað fekk henda biljagstranin eisini, tá ið løgreglan at enda fekk fatur á manninum norðuri í Svínáum.

## Breyt beinið

Beint eftir døgurða sunnudagin fekk løgreglan fráboðan um, at ein maður var gliðin í Skorunum millum Skæling og Norðadal. Maðurin var saman við fleiri øðrum, og tey fingu givið boð frá sær, og tyrlan kom eftir manninum, sum bleiv fluttur á landssjúkrahúsið við brotnum beini.

**tn**

# 30 ára gamal gjørdi um seg

**Ein 30 ára gamal maður gjørdi um seg í høvuðsstaðnum sunnunáttina. Hann bleiv tikin fyri at koyra ávirkaður í stolnum bili og uttan koyrikort**

POLITITÍÐINDI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var um eitt-tíðina sunnunáttina, at løgreglan steðgaði einum bili við trimum fólkum í. Tá ið bilurin bleiv steðgaður, sluppu tey trý fólkini sær til rýmingar, men løgreglan fekk skjótt fatur á teimum inni í einum húsum, har tey royndu at goyma seg.

### Stolið bilin frá bilasølu

Tað vísti seg, at bilurin, sum tey trý koyrdu í, var stolin frá einari bilasølu í høvuðsstaðnum. Tann 30 ára gamli maðurin, ið koyrdi bilin, var eisini rúsdrekkávirkaður, og haraftural hevði hann mist koyrikortið.

Bilførarin kann tí fyrireika seg til at møta upp í rættinum, har hann verður ákærdur fyri stuldur, rúsdrekkakoyring og fyri at føra bil í frádømingartíðini. Fyri at gera ilt verri, so gjørdi sami maður um seg seinni um náttina, eftir at hann var leyslatin av løgregluni. Tá fekk løgreglan nevnliga boð um, at maðurin gjørdi ónáðir á einum dansistað í Havn, men tá ið løgreglan kom á staðið, var maðurin rýmdur.